# ítróttur

Nr. 242 • fríggjadagur • 16. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Hørð kapping á Cippo

**Fyrsta royndin við sonevndari sportsnight var sera væleydnað. Eini 40 fólk høvdu leitað sær oman at kappast í pool, airhockey og borðfótbólti**

**SPORTSNIGHT**
*Jákup Mørk*

Talan er sum so um nýtt fyribrigdi í Føroyum. Aðra staðni hevur tað í fleiri ár verið vanligt at skipað fyri kappingum í teimum sonevndu bar-sports. Men her heima hevur hetta ikki verið serliga vanligt. Einamest, tí tað ikki hevur verið nakað stað, har fleiri av kappingargreinunum í hesum hava verið savnaðar.

Á Cippo fevndu kappingarnar um borðfbólt, airhocky og pool, men hvør veit, um ikki dart, backgammon ella kanska ein sports-quiz eisini fara at koma á skránna í næstum.



*Heini Mortensen vann greiðan sigur, tá kappast varð í finaluni í fótbólti*

### 40 mans um borðini

Í øllum førum má staðfestast, at undirtøkan fyri kappingunum var rættiliga góð. Tað var ikki fyrr enn mikukvøldið, at boðini um hetta komu alment út, men hóast stutta skotbráðið, so vóru á leið 40 mans (eingin kvinna var at síggja), sum høvdu teknað seg.

Klokkan 20 fóru so fyrstu dystirnir ígongd, og so var bara at koyra á. Spenningurin var øgiligur í fleiri førum, tá luttakararnir við sveittabroti stríddu seg fram ígjøgnum cup-skipanina, sum var galdandi hetta kvøldið.

Rópini høvdu til tíðir hug at harðna, tá tað ikki gekst eftir vild, og onkra tíð mundu eiðirnir eisini fara sendandi gjøgnum luftina. Hvussu var og ikki, so eydnaðist spakuliga at finna fram til finaluluttakararnar. Og sum so var talan um meira enn bara ein dyst, tá finalurnar stóðu á skránni. Umframt vinningarnar til hvørt kvøldið sær, sum Føroya Bjór, Heineken og Sports-Master lata, er eisini ein enn størri høvuðsvinningur. Nevnliga ein fótbóltsferð til Champions League-finaluna. Tann vinnarin verður tó ikki funnin, fyrr enn øll ítróttarkvøldini eru av.

Finalurnar í borðfótbólti og air-hockey vórðu annars skipaðar soleiðis, at spælt varð best av trimum. Í pool varð talan bert um tann eina dystin, tá hetta jú er ein kapping, har dystirnir gjarna taka nakað longri tíð.

Men fram til tá, er lítil ivi um, at spenningurin verður í hæddini hóskvøld á Cippo.



*Pool er helst tann av kappingargreinunum, sum er best kend í Føroyum. Og tann kappingin hevði eisini góða undirtøku hóskvøldið*

## Hondbólts-parið fer til Íslands

Eyðun L. Samuelsen og Andreas F. Hansen, sum eru nýggju føroyingarnir í altjóða høpi í hondbóltsdøming, skulu nú undir sína næstu altjóða uppgávu.

Hesa ferð er talan um tveir dystir í EHF-Cup, og verða hesir spældir í Íslandi tann 8. og 9. januar. Talan er um dyst í triða umfari, og tað vil við øðrum orðum siga, at nú eru sterku hondbóltstjóðirnar eisini komnar í part. Í veldugu høllini á Hafnarfirði skulu teir báðir føroyingar soleiðis døma dystirnar millum íslendsku Haukar og kroatisku Podravka Vegeta, sum eru styrkismettir, og tí nústaðni gerast partur av kappingini.

At teir báðir longu nú sleppa at døma dyst, har eitt av styrkismettu liðunum er við, er greitt tekin um, at talan var um gott avrik, tá teir fyri góðum mánaði síðani fyri fyrstu ferð dømdu altjóða dyst. Ta ferðina var talan um dyst í Noreg, og skoðsmálið frá eygleiðaranum var framúr gott. Stigevingin fyri dómarar gongur upp í 100, men tað er sera sjáldan, at talið fer upp um 90. Hjá Eyðuni og Andreas segði stiggevingin 84 í fyrstu royndini, og tað má metast sum væl og virðiliga góðkent.

**-mørk**


## Lærlingar til Telebúðirnar í Runavík og í Klaksvík

"Tað er ikki tí, at tað er trupult, at vit ikki tora. Tað er tí, at vit ikki tora, at tað er trupult"

Seneca



**Søkt verður eftir tveimum lærlingum til Telebúðirnar í Runavík og Klaksvík skjótast gjørligt.**

Føroya Tele hevur sjey Telebúðir kring landið. Telebúðirnar hava ment seg munandi seinastu árini, og ætlanirnar fyri framtíðina eru stórar. Søkt verður eftir tveimum lærlingum, sum skulu luttaka í øllum uppgávum, ið skulu til fyri at kundar okkara fáa eina góða tænastu.

Til røttu fólkini hava vit sera spennandi lærupláss.

**Til læruplássini ynskja vit fólk við:**
· førleika at seta seg inn í nýggja tøkni
· evnum at samstarva við ymiskar samstarvsbólkar
· ídni at røkka ásettum málum

**Lærutíðin er:**
· 3 ár við FHS
· 2 ár og 18 vikur við Studentaprógvi, HF ella HT
· 2 ár við HH

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið galdandi fyri Føroya Tele.

Telebúðirnar eru opnar allar vanligar handilstíðir og arbeitt verður í skiftum við hini starvsfólkini í handlunum.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Pól Sundskarð á tel 303461 ella Starvsfólkadeildina á tel 303030.

Umsóknir skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. desember 2005 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

**FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í nýggja felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og øll støðarúgerð fyri fastnetstelefoni og breiðband. Broytingin til nýggja dótturfelagið er við til at tryggja eins treytir fyri kappingarneytarnar á marknaðinum. Hesir nýggju karmarnir geva nýggjar møguleikar at veita betri og bíligari tænastur til kundarnar. Í felagnum starvast 105 fólk. Tænastur fra FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*